Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Undirskrift formansins: _____

Ár 2011, hin 13. desember 2011 kl. 17:30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:
Jógvan Skorheim, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Óli M. Lassen, Atli S. Justinussen, Óluva Klettskarð, Auðunn Konráðsson, Steinbjørn O. Jacobsen, Signhild V. Joensen, Jákup F. N. Mikkelsen og Jákup Skoradal.

2011/155.
11/00932 Áseting av fundardøgum 2012 – Býráðið

Uppskot er um hesar býráðsfundardagar fyri 2012:

24. januar	19. juni
21. februar	11. september
20. mars	9. oktober
1. mai	6. november
29. mai	11. desember

FeN 29. nov. 2011: Mælt verður til, at nýggj fundartíð hjá nevndini í 2012 verður mánadag kl. 13.00

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/156
08/00135 Umboðsnevndin fyri IRF 2009-2012

Veljast skal ein nýggjur limur í nevndina fyri IRF fyri Jógvan Skorheim, býráðslim, sum noyðist at leggja frá sær, tí hann er valdur í Føroya Løgting.

Býráðsins samtykt:
Málið útsett.

2011/157.
11/00909 Stuðul til byrjanarútreiðslur – Grunnurin Spinnaríið

Vísandi til umsókn frá Grunninum Spinnaríið um byrjanarstuðul áljóðandi kr. 30.000,- hava formenninir í Mentanarnevndini og Teknisku Nevnd saman við borgarstjóranum avrátt, at nevndirnar skulu standa saman um at útvega neyðugu upphæddina, soleiðis at kommunan í inniverandi ári kann veita Spinnarínum omanfyri nevndu upphædd sum bráfeingis stuðul.
Formenninir og borgarstjórin mæla til hesa fígging av nevnda stuðuli, sum verður bókaður av játtanini til ymsar studningar:

At flyta millum kontur av játtanini til moldgoymslu (Tekniska Nevnd)	Kr. 10.000,-
At flyta millum kontur av játtanini til lýsingarútreiðslur (Fíggjarnevndin)	Kr. 10.000,-
At taka av kontuni til ymiskan studning (Mentanarnevndin)	Kr. 10.000,-

Tær báðar fyrst nevndu kr. 10.000,- verða fluttar millum kontur frá viðkomandi kontum til kontuna ”Ymiskur studningur” hjá Mentanarnevndini, har tann samlaða útgjaldingin áljóðandi kr. 30.000,- verður bókað.

Málið er avgreitt, vísandi til § 31, stk. 2, í kommunustýrislógini, har tað er ásett, at nevndarformaður/borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða, ella har ongin orsøk er til iva.

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Skriv er latið Spinnarínum við fráboðan um játtanina, sum er bráfeingis neyðug, fyri at grunnurin skal kunna virka frá byrjan, nú nevndin er farin til verka. Upphæddin ætlast brúkt til at tryggja bygningin og umstøðurnar annars í s.v. ognina, og til tær fyrstu útreiðslurnar, sum ein nýstovnaður grunnur altíð hevur.
Málið verður við hesum lagt fyri nevndirnar og býráðið við tilmæli um samtykt.

TN 29. nov. 2011: Nevndin tekur undir við tilmæli frá umsitingini, dagf. 18. november 2011.

MeN 30. nov. 2011: Nevndin tekur undir við Teknisku Nevnd 29. november 2011.

FíN 7. des. 2011: Nevndin tekur undir við Teknisku Nevnd 29. november 2011 og Mentanarnevndini 30. november 2011

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/158.
11/00758 Stadionøkið – fótbóltsvøllur/røktarheimið – eykajáttan 2011 - *2. viðgerð*

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 15. november 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/159.
11/00405 Eldskaði á Skúlanum á Ziskatrøð – eykajáttan 2011 - *2. viðgerð*

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 15. november 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/160.
10/00860 Skúlin á Ziskatrøð – eykajáttan 2011 - *2. viðgerð*

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 15. november 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/161.
09/00571 Nýggjur fótbóltsvøllur – eykajáttan 2011 - *2. viðgerð*

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 15. november 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

2011/162.
11/00115 Spælipláss í Víkunum setast í nýtiligan stand – *2. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Býráðið samtykti í mai 2011 at játta 80 túsund krónur til spæliplássið í Víkunum, og er hesin peningur nýttur til at seta økið í nýtiligan stand.
Sum kunnugt rakk upphæddin ikki til liðugtgerð av spæliplássinum.
Forkvinnan í SoN hevur heitt á Teknisku Umsiting um at leggja eitt uppskot fyri um útvegan av meiri peningi til ætlanina. Hetta kann gerast við flytan millum konti frá íløgukontoini hjá Ellis- og røktarheiminum til liðugtgerð av spæliplássinum í Víkunum, eina upphædd upp á 90 túsund krónur.
Áður er mett, at øll røktarheimsjáttanin helst ikki verður brúkt í ár, og tí skuldi rúm verið fyri nevndu flyting.
Tekniska Umsiting vil staðiliga heita á nevndir og býráð, um at steðga við at fíggja onnur mál av røktarheimsjáttanini vísandi til serligu avbjóðing kommununnar at útvega pening til kravdu íløguarbeiðini komandi árini, sum vit eisini áður hava vísst á.

TN 29. nov. 2011: Nevndin tekur undir við notati frá TU dagf. 29. november 2011.

SoN 30. nov. 2011: Nevndin mælir til at flyta kr. 90.000,- av íløgukontuni Ellis- og røktarheimið til liðugtgerð av spæliplássinum í Víkunum.

MeN 30. nov. 2011: Nevndin tekur undir við notati, dagfest 29. nov. 2011 frá Hera M. Hammer, býarverkfrøðingi.

FíN 7. des. 2011: Nevndin tekur undir við Teknisku nevnd 29. november 2011, Sosialu nevnd 30. november 2011 og Mentanarnevndini 30. november 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/163.
11/00955 Skaði á gøtuljós, ódnarveður í nov. 2011 - eykajáttan – *1. viðgerð*

Í ódnarveðrinum, ið var hóskvøldið 24. nov. 2011 hendu skaðar á gøtuljós á Oyravegnum, Flatnavegnum, Gerðavegnum og í Árnafirði. Ein fyribils meting sigur, at kostnaðurin fyri umvæling verður um kr. 150.000 – 200.000. Av tí at gøtuljósini ikki eru tryggjað, verður biðið um eina eykajáttan til at gera skaðarnar aftur.

TN 29. nov. 2011: Vísandi til frágreiðingina hjá leiðaranum á vatn- og gøtuljósdeildini, dagf. 29. nov. 2011, mælir nevndin til eykajáttan uppá 200 túsund krónur.

FíN 7. des. 2011:: Nevndin tekur undir við Teknisku nevnd 29. november 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.